# Hoyra føroyingin á Ríkissjúkrahúsinum

**Við hjálp frá góðum kreftum og stuðli frá Christian í Grótinum, er nú møguligt hjá sjúklingum á Ríkissjúkrahúsinum at hoyra Útvarp Føroya á sjúkraleguni**



*Nú ber til hjá sjúklingum at hoyra Útvarp Føroya á sjúkraleguni á Ríkissjúkrahúsinum. Hetta hendi herfyri, tá Christian í Grótinum læt pening til eina teldu, sum mátti til, um hetta skuldi lata seg gera*

*Savnsmyndir*



ÚTVARP OG SJÚKRALEGA

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Mangur føroyingur man millum ár og dag hava kent seg einsamallan, tá hann ella hon mátti halda til á Ríkissjúkrahúsinum í longri tíð.

Men so hvørt samskiftismøguleikarnir eru vorðnir betur og betur, er eisini vorðið lættari at fáa samband við tey heima.

Tað nýggjasta er, at nú ber til hjá sjúklingum at hoyra Útvarp Føroya á sjúkraleguni á Ríkissjúkrahúsinum. Hetta hendi herfyri, tá Christian í Grótinum læt pening til teldu og aðra útgerð, sum mátti keypast til endamálið.

Tað var Øssur Berghamar, trúboðari, sum vendi sær til ein avvarðandi, sum í útvið eitt ár hevði hildið til á Hotel Tórshavn, og spurdi hann, um tað ikki hevði verið ein møguleiki at funnið eina loysn, so sjúklingar á Ríkissjúkrahúsinum kundu hoyrt útvarpið.

Hesin hevði, meðan hann var á sjúklingahotellinum, gjøgnum sponsorar í Føroyum, útvegað hotellinum betur telduviðurskifti.

Teknikkarin á Ríkissjúkrahúsinum var serstakliga hjálpsamur og spentur upp á hugskotið. Einasta, hann mátti tryggja sær var, at einki kundi koma inn í telduskipanina hjá sjúkrahúsinum, sum kundi seta skipanina í vanda. Tí var neyðugt, at fáa eina teldu til vega, um hetta skuldi lata seg gera.

So varð farið undir at royna at fáa pening til vega, og heitt varð á fleiri føroyskar fyritøkur um at stuðla tiltakinum.

Fyritøkan, sum var skjótast at játta pening til ætlanina, var tann hjá Christian í Grótinum - og skjótt var alt leyst og liðugt, og nú hoyra sjúklingarnir á Ríkissjúkrahúsinum Útvarp Føroya frá morgni til myrkurs.

Eftir hvat vit skilja, er neyðugt við einari teldu til hvørja føroyska sendistøð, sum ynskir at hoyrast á Ríkissjúkrahúsinum.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 52, 2004
www.kaupthing.fo

# Ein friðarlig vika í væntu

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku setti amerikanski tjóðbankin leiðandi rentuna 0,25% upp, so hon nú er 2,25%. Tey nærkast soleiðis alsamt málinum um at hava eina rentu, sum er eitt sindur hægri enn prísvøksturin. Tað er tó nakað eftir á mál, og Kaupthing væntar, at tey fara at halda áfram við rentuhækkingunum í 2005. Rentuhækkingin varð væntað av fíggjarmarknaðunum, sum vóru meiri áhugaðir í tí tilhoyrandi tíðindaskrivinum. Tað var tó ikki broytt í mun til skrivið í novembur.

Í USA vístu hagtølini annars veksandi smásølu og ídnaðarframleiðslu. Undirskotið á gjaldsjavnanum var metstórt, men minni enn væntað. Útlendskar íløgur vóru í oktobur á lægsta støði í eitt ár, og tað fekk dollaran at lækka. Prísvøksturin í USA hækkaði sum væntað, og var í novembur 3,5%. Frároknað olju og matvørur hækkaði prísvøksturin 2,2%. Amerikanski prísvøksturin verður áhugaverdur komandi mánaðirnar, tí m.a. framleiðsluprísirnir kundu bent á, at prísirnir hjá vanliga brúkaranum fara at hækka.

Í Evropa vístu hagtølini, at prísvøksturin lækkaði eitt vet í novembur, frá 2,3% í oktobur til 2,2%. Nakað óvæntað vísti týska Ifo-búskaparálitistalið bæði eina betri meting av núverandi búskaparligu støðuni og betri vónir til framtíðina. Tað er rættiliga áhugavert, eftirsum eisini ídnaðarálitistalið ZEW bendi á framgongd. Í Týsklandi væntar tó nógv, áðrenn landið er komið rættiliga í gongd búskaparliga.

Oljuprísurin hækkaði í farnu viku, úr 38 upp í 43 dollarar. Tað var mest orsakað av nýggjum yvirgangshóttanum frá Osama Bin Laden, og ótta fyri einum køldum vetri. Tað var við til at halda lánsbrævarentunum niðri. Tað sama gjørdi viknandi dollarin.

Hesa vikuna koma ikki nógv áhugaverd lyklatøl. Tey, ið kanska fara at flyta marknaðin verða ordrar eftir varandi vørum úr USA, og prísvakstrartøl úr Týsklandi. Soleiðis kundi sæð út til at vikan verður friðarlig á lánsbrævamarknaðinum. Tó kunnu renturnar ávirkast av, at nakrir íleggjarar velja at enda teir opnu strategiirnar í sambandi við at árið endar.

Meðan tey amerikansku partabrøvini liggja áleið á sama stigi sum fyri viku síðan, fullu tey evropisku eitt sindur, serliga orsakað av lækkandi dollaraprísi og hækkandi oljuprísi og møguliga av, at íleggjarar staðfestu vinning fram móti ársenda. Fleiri fara so smátt at halda jólafrí, so væntandi verður tað ið eftir er á vikuni friðarligt á partabrævamarknaðinum.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,46% | 0,05% |
| 5 ára lánsbræv | 3,20% | 0,01% |
| 10 ára lánsbræv | 3,80% | -0,02% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 277,6 | -0,7% |
| OMX, Svøríki | 728,9 | -1,1% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.891,5 | -0,4% |
| S&P 500, USA | 1.194,2 | 0,5% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,68 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 171,73 | 0,4% |
| Norran Partabrøv | 86,22 | 0,3% |
| Altjóða Vøkstur | 58,71 | 1,8% |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,59 | -0,6% |
| EUR | 7,43 | 0,0% |
| GBP | 10,84 | 0,8% |
| NOK | 0,90 | -0,1% |

*Renta og kursur kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*